# FUNDARBÓK HJÁ
# VÁGS BÝRÁÐ 2013

<table>
<tr><td colspan="2">Fundur nr. 4<br>Tíð: 15. apríl 2013 kl. 19.00<br>Stað: Kommunuskrivstovan</td><td colspan="2">Skrivari: Petry Joensen</td></tr>
<tr><td>Fastir fundardagar:<br>14. januar, 11. februar, 14. mars,<br>15. apríl, 30. mai, 17. juni,<br>19. august, 23. september,<br>28. oktober, 25. november,<br>19. desember</td><td colspan="2">Møttir:<br>Allir býráðslimur uttan<br>Poul W. Augustinussen</td><td>Ikki á Fundi:<br>Poul (fráboðað)</td></tr>
</table>

**1) Mál nr.: 13/00046** Avsláttur til foreldur sum hava fleiri børn í ansingini hjá Vágs kommunu

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá Mentunarnevndini um, at foreldur gjalda fult ansingargjald fyri fyrsta og annað barnið, fyri triðja barnið er gjaldið 50% og fyri fjórða barnið 25% av fullum kostnaði.
Fíggjarnevndin mælir býráðnum til at taka undir við hesum.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

**2) Mál nr.: 13/00059** Eykajáttan til liðuggerð av barnaansingarstovninum við Kráir, seinna viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til seinnu viðgerð tilmælið frá fíggjarnevndini um, at játtan 1.800.000,00 kr. sum eykajáttan til liðuggerð av barnagarðinum.
Eykajáttanin skal nýtast til m.a. planering, asfaltering, stoypa garð, spælipláss og innbúgv.
Eykajáttanin var einmælt samtykt til fyrru viðgerð á býráðsfundi 14. mars.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at játta hetta av innistandandi.

Undirskriva:

**3) Mál nr.: 13/00069** Ognin matr.nr. 611h

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram málið viðv. ognini matr.nr. 611h. Kommunurnar í Suðuroyar sunnaru helvt keypti hesa ogn sum skuldi nýtast til bústað hjá kommunulækna.
Kommunulæknin hevur keypt sær egin hús í Vági, og vantast at flyta úr í summar 2013.
Fíggjarnevndin hjá Vágs kommunu hevur viðgjørt hetta mál á fundi 25. februar og samtykti nevndin tá, at mæla býráðnum til at selja ognina, tá hon ikki longur skuldi nýtast sum lækna bústaður.
Áðrenn málið var lagt fyri Vágs býráð skulu hinar eigara kommununnar taka støðu til málið.
Sumbiar- , Porkeris- og Hovs kommuna taka allar undir við at lýsa ognina til sølu.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at lýsa ognina til sølu.

**4) Mál nr.: 13/00069** Eykajáttan til at mála Eldrasambýlið

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram, umbøn frá Sosialu nevnd um eina eykajáttan uppá 99.925,00 kr. til at mála Eldrasambýlið uttan.
Fíggjarnevndin hevur á fundi 15. mars einmælt samtykt, at mæla til at miðja eftir at fáa hetta við í fíggjarætlanina 2014.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at beina málið í Teknisku nevnd. Tekniska nevnd skal gera eina meting av tørvi.

**5) Mál nr.: 13/00093** Grundstykkir í Vágs kommuna

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini um,at mæla býráðum til at selja grundstykkini, sum eftir eri í útstykkingini í Gjógvarábø fyri 50.000,00 kr. stykkið, byggjast skal á økinum innan tvey ár ella kann Vágs kommuna ogna sær stykkið aftur fyri 50.000,00 kr..

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Undirskriva:

**6) Mál nr.: 13/00047** IT politikkur

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til góðkenningar KT-trygdarpolitkk fyri Vágs kommunu. Politikkurin verður dagførdur við jøvnum millumbilið. Dataeftirlitið hevur havt IT politikkin til ummælis og teirra viðmerkingar eri innarbeiddar í seinasta uppskotið.

**Avgerð:**
Góðkendur uttan viðmerking.

**7) Mál nr.: 13/00104** Velja limir í nevndina "Vardar Íbúðir"

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmæli frá fíggjarnevndini um, at velja 5 limir í nevndina fyri Vardar Íbúðir

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at limirnir í Sosialu nevnd, borgarstjórin og varaborgarstjórin manna nevndina.

**8) Mál nr.: 13/00107** Velja lim í nevnd "at hava eftirlit við Hamragarði"

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram áheitan frá Tórður Poulsen, býráðslimi sum hevur verði limur í nevndini, um at velja Poul W. Augustinussen sum nýggjan lim.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot kom frá Heri Hjelm upp at velja Conrad Gaard Joensen í nevndina. Atkvøtt bleiv um broytingaruppskotið fyrst. Conrad og Heri atkvøddi fyri og 6 ímóti. Síðan bleiv upprunauppskot sett undir atkvøðugreiðslu, 7 atkvøddi fyri, Conrad atkvøddi ikki.

**9) Mál nr.: 13/00116** Eykajáttan til skipan við ung í arbeiðið 2013, fyrra viðgerð

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram tilmælið frá fíggjarnevndini um, at mæla býráðnum til at seta hesa skipan í verk aftur í summar 2013 og at játtan 120.000,00 kr. sum eykajáttan til endamálið.
Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt, at játta hetta av innistandandi.

Undirskriva:

**10) Mál nr.: 13/00123** IRF Ársaðalfundur, kunning

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram til kunningar innkalling til Ársaðalfund 19. apríl 2013.

**Avgerð:**
Kunnað.

Undirskriva: